BLÁI STÓLURIN



# Rókur Jakobsen • samskiftislesandi sangari úr • Havn, 26 ár

Lýs teg sjálvan við trimum orðum:
**Forvitin, friðarligur og hampiligur**

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
**Eg haldi, at eg havi alt ov lætt við at siga "ja". Hetta er nakað, ið eg má arbeiða við, tí at eg drukni meg sjálvum í "ja"um.**

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
**Ahem, øllum tí sum ger hana til kvinnu, haldi eg. Tá tað er sagt, er tað allarhelst hennara sjálvsvirðing, sum ger hana áhugaverda. Tað er ótrúliga týdningarmikið (fyri meg), at hon hvílir í sær sjálvari, at hon ikki pátekur sær nakað, sum hon í veruleikanum ikki er.**

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
**Uml. 6 min. Eg skal pissa, lata meg og busta tenn, og so eri eg klárur. Eg fari helst í brúsu kvøldið fyri, tí at so sleppi eg jú at sova einar 20 minuttir longri um morgunin, og tað eru heilt vist hesir 20 minuttirnir, sum bjarga degnum fyri framman.**

Hvat stressar teg?
**At verða í bíðistøðu. Tað er tað ringasta eg veit, at vita at man hevur eitt arbeiði at gera, men man sleppur ikki framat tí beinanvegin.**

Hvat gleðir teg?
**At vera saman við damuni, familju og vinum. Annars er tað sjálvandi eisini ein fragd at hoyra góðan tónleik.**

Nær feldi tú seinast eitt tár?
**Tá ið abbi fór til jarðar í fjør**

Nær smakkaði tú tær seinast á?
**Seinasta leygarkvøld….og tað var stuttligt.**

Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?
**Eg havi akkurát brúkt alt ov nógvar pengar uppá ein nýggjan gittar. Men eg royni at minna meg sjálvan á, at eg havi leingi ynskt mær hann, og at eg havi uppiborið hann. Men eg vil generelt siga, at tað sær út til, at nógv av mínum ynskjum spakuliga fara at uppfyllast nú, og hetta gleðir meg alsamt.**

Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at lesa samskifti?
**At halda tunguna mitt í munninum. Samskifti er eitt øgiliga breitt og stórt øki, og tú kanst ógjørligt fáa eitt fullkomið yvirblikk yvir alt økið. Hav tol, og fyri Guðs skyld, ver opin.**

Hvar arbeiðir tú?
**Eg eri í starvsvenjing í Innlendismálaráðnum. Her sleppi eg at royna meg við stórum og møtimiklum uppgávum, og hettar dámar mær stak væl. Annars spæli eg nógvan tónleik, og fáist annars við fyrifallandi arbeiði. Eg skal í holt við mína serritgerð nú, so nógv av míni frítíð fer við at fyrireika arbeiðið fyri framman.**

Hvat er besta uppfinningin og hví?
**Mikrofonin er eitt gott uppfinnilsi, tí um hon ikki var til, hevði tað verið nokkso strævið hjá mær. Annars haldi eg, at uppfinningar sum tannkrem og hjólið eru nýtiligar!**

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
**Tvær kvitteringar, eina 20 krónu og tveir plektarar**

Hvat er títt besta heimaráð?
**Tú mást ongantíð lata uppgávur hópa seg upp. Far undir tær meðan tær enn eru lítlar og skjótar at fáa úr verðini. Her hugsi eg um uppvask, rudding og græsplenusláing v.m.**

Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?
**Nógvir av okkara kendu sjónleikarum eru stuttligir. Jákup Weihe er avgjørt ein teirra. Og ikki minst haldi eg Jóhann í Kollafirði er stuttligur. Og eisini eru nógvir av mínum góðu vinmonnum sera stuttligir...eg veit ikki, her eru so nógvir stuttligir persónar í Føroyum. Áh ja, Niels Galan er eisini framúr stuttligur á palli.**

Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?
**Hatta er torført at svara uppá, tá ið man ikki vil traðka nakran yvir tærnar. Men eg kann sanniliga sjálvur verða keðiligur nú og tá, men tað kunnu vit øll vera.**

Hvussu ofta speglar tú tær
**Eg haldi at eg spegli mær ofta. Eg eri helst nógv meiri forfeingiligur, enn eg geri meg til at vera….**

Hvussu ofta ert tú hjá frisør?
**Tvær ferðir um árið, kanska. Eg eigi ein trimmara, og hann plagar at hjálpa mær, tá ið eg ikki longur síggi nakað fyri fruntinum…**

Hvør er tín løgnasta tónleikauppliving?
**Einaferð spældi eg eina konsert í Suðuroy við einum nokkso provokerandi bólki. Og tá stóð ein maður millum áhoyrararnar og rætti mær miðfingurin - í meir enn ein tíma. Eg haldi tað vera rættiliga løgið, at hann tímdi at gjalda eitt atgongumerki uppá 120 krónur, bara fyri at vísa sína ónøgd við meg. Men tá ið konsertin var liðug, endaði ein partur av hansara pengum í mínum lumma, so eg skal helst ikki klaga…!**